# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Tað harmar meg, at tveir hermenn eru falnir í Afghanistan, men Taliban má ikki vinna (Anders Fogh Rasmussen).*

## Hóttu við harðari tiltøkum

**Munkarnir og hini mótmælisfólkini í miðbýnum í Yangon fingu 10 minuttir til at umráða seg í**



*Í dag vóru færri munkar við í mótmælunum, tí løgreglan hevði kringsett kleystrini í Yangon*

Boðini frá løgregluni í Myanmar í morgun vóru greið: Fóru mótmælisfólkini ikki burtur innan 10 minuttir, fóru løgreglumenninir at brúka tað, sum bleiv kallað "harðari hættir" fyri at fáa tey burtur haðani.

Tá vóru fleiri túsund fólk komin saman í miðbýnum í Yangon, men sambært CNN gjørdu tey av at gera eftir boðunum frá løgregluni. Men tey sluppu ikki at gera av, hvønn veg tey fóru, tí allur miðbýurin var avbyrgdur, sigur CNN.

Annars vóru munandi færri munkar við í mótmælisgonguni í Yangon í morgun enn hinar dagarnar. Orsøkin er helst, at løgreglan kringsetti fleiri kleystur í lýsingini í morgun fyri at forða munkunum at sleppa at taka lut í mótmælunum.

Summar tíðindastovur søgdu seg hava fingið upplýsingar um, at fólk høvdu skipað fyri mótmælisgongum aðrastaðni í Myanmar í morgun, men sum skilst hevði løgreglan bara lagt upp í mótmælini í Yangon.

## Russar við nýggjum flogfari

**Superjet 100 er fyrsta ferðamannaflogfarið hjá russum, síðani Sovjetsamveldið datt sundur**

Russiska flogverksmiðjan Sukhoi leggur seg nú út í kappingina á flogmarknaðinum við einum spildurnýggjum flogfari, sum hevur fingið heitið Superjet 100.

Nýggja flogfarið, sum hevur tveir motorar, og sum tekur 110 ferðafólk, skal taka upp kappingina við verksmiðjurnar Embraer og Bombardier. Sukhoi hevur gjørt nýggja flogfarið í samstarvi við vesturlendskar fyritøkur, eitt nú amerikonsku Boeing.




*Superjet 100 varð sýnt fram í Moskva í gjár*

## Norski oljugrunnurin mist nógvar milliardir

**Fellandi virðið á dollaranum og bretska pundinum hevur kostað norska oljugrunninum allan vinningin í 2006**

Í fjør forvann almenni, norski oljugrunnurin 185 mia. norskar krónur burtur úr sínum parta- og virðisbrøvum.

Men gleðin av tí góða avkastinum gjørdist stokkut. Fellandi virðið á amerikanska dollaranum og bretska pundinum mótvegis norsku krónuni hevur gjørt, at allur vinningurin í fjør er etin upp av kurstapi, skrivar Finansavisen. Bara tann seinasta mánaðin er dollarin fallin 5,2 prosent og bretska pundið 5,5 prosent, og tað hevur kostað oljugrunninum heilar 67 mia. norskar krónur, skrivar blaðið.

Av virðisbrøvunum hjá oljugrunninum eru 39 prosent í evrum, 32 prosent í amerikonskum dollarum og 13 prosent í bretskum pundum.

### STUTT SAGT

## Lønin upp eystanfyri

Munurin á arbeiðaralønini í teimum eysturevropeisku og teimum vesturevropeisku londunum minkar í hvørjum. Tað stendur í einari frágreiðing hjá ES. Sum dømi verður nevnt, at í Danmark hækkaði reallønin 0,8 prosent í fjør, meðan hon hækkaði 10 prosent í teimum trimum baltisku londunum. Men vandi er í hvørjari vælferð, tí tann minkandi lønarmunurin ger tað samstundis truplari hjá londunum vestanfyri at fáa arbeiðsmegi eystaneftir.

## Mærsk fann olju

Feløgini, sum leita eftir olju í algerisku oyðimørkini, hava rakt við olju í einum øki, sum eitur Zemlet El Naga, skrivar Reuters. Í hesari verkætlanini eru danska A.P.Møller - Mærsk, Andarko og almenna algeriska oljufelagið Sonatrach. Oljan er funnin á 3.611 metra dýpi. Hetta er tað 16. oljufundið í Algeria higartil í ár. Alt árið í fjør funnu oljufeløgini 18 nýggjar brunnar.

## Aftur spenningur

Í seinastuni hava viðurskiftini millum Russland og grannalandið Georgia verið tolilig, men nú er aftur vátt komið í reiðrið. Orsøkin er, at georgiskar trygdardeildir hava skotið ein russiskan hermann á markinum millum londini. Georgisku myndugleikarnir siga, at russiskir hermenn komu um markið at venja brotsmenn, men russar halda uppá, at hermaðurin var russisku megin markið, tá hann bleiv skotin. Georgiski forsetin, Mikhail Saakashvili, hevur sett sær at loysa landið frá Russlandi og at fáa tættari tilknýti til Vesturheimin, og tað hóvar ikki russum, skrivar AP.